



*Nakrir dagar eftir, at Rákið hevði vitjað Bjørghild og Martin, hevði Martin fingið nýggju møblarnar inn í stovuna, og myndamaður okkara fekk eina mynd av teimum.*



» *– Nú er Bjørghild sloppin av avgera alt annað í húsinum, so eg eri sloppin at eiga stovuna – og hasir møblarnir skulu inn, argar Martin og vísir okkum myndina av Chesterfieldmøblunum*

» *Ja, mær dámar ikki møblarnar, flennir Bjørghild*

Sumba, og har ferðast hann og Bjørghild fleiri ferðir um árið. Har er einki internet, og tað ber bara til at síggja Sjónvarp Føroya í sjónvarpinum.

– Tað er okkara frístaður, sgur Bjørghild.

Meðan vit sita og eta, práta vit eitt sindur meira um, hvat skal henda inni í stovuni.

– Vit mála vindeyguni við høgglans máling. Tað ger, at tey verða nógv lættari at vaska, sigur Bjørghild.

– Tá vit bygdu húsini, vóru risastór vindeygu í stovuni, sum vendu beint oman til grannan. So vit hava sett minni vindeygu í nú. Vit høvdu eisini teppi á gólvinum, sum man hevði í 80unum. Men har varð parkettgólv lagt á ístaðin. Vit hava bara keypt eitt gólv, sum er ov tunt, tað slítist ov lætt, sigur hon. Tey ætla nú at keypa eitt meira massivt gólv.

– Eg havi altíð ynskt mær ein karnap, men tað ber ikki til í hesum húsinum, sigur Bjørghild, tað verður í næsta lívinum.

**Javngamlir grannar**

Tað eru nógv viðurskifti í heiminum, sum Bjørghild og Martin eru sera glað fyri.

– Grannalagið er so gott, at vit flyta nokk ongan veg, sigur Bjørghild. Flestu nábúgvarnir fluttu higar samstundis sum tey, so tey eru komin at kennast væl.

– Vit renna ikki inn til hvønn annan dagliga, men vit koma væl út av tí, leggur hon afturat.

Tá eg spyrji, hvat tey eru mest glað fyri, veit Martin beinanvegin, hvat hann skal svara:

– Eg verði nokk mest glaður fyri mahogni møblarnar.

– Og eg haldi, at eg eri glaðast fyri seymirúmið, sjálvt um eg ikki hava so góða tíð at sita har niðri, nú eg eri undir útbúgving.

Vit takka Bjørghild og Martin fyri, at tey lótu heimið upp til eitt prát um, hvussu krøvini til eitt heim broytast, alt eftir, hvar vit eru stødd í lívinum. Tey bæði eru í øllum førum livandi prógv um, at vit meiri enn so kunnu fylla húsið við lívi og virksemi, hóast børnini eru flutt út.

*Bjørk K. Olsen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*